TILTØK

Missiónshúsið, Selatrað
Sunnukvøldið kl. 19 Møti v/ John Myllhamar, trúb. Innsavning.

Gøta
Ungdómsmøti í kirkjukjallaranum í kvøld **er avlýst vegna møti í Fuglafirði kl. 20.** Bilar koyra frá kirkjuni kl. 19.45. Øll eru hjartaliga vælkomin við.

Tofta missiónshús
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við sangi og vitnisburði. Vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jóhan Petur Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Barnarbeiði (3) 4 til 6 ár. kl. 14 Barnarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnarbeiði 4., 5. og 6. fl. kl. 20 Evangel. møti uppi í Samljóð við Svenning á Lofti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti við Svenning á Lofti. Verið hjartaliga vælkomin.

Samljóð, Skopun
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. møti við Svenning á Lofti. Verið hjartaliga vælkomin.

Skopunar missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

Ungmannafelagshúsið á Sandi
Í sambandi við ungdómsleguna, sum er í húsinum í vikuskiftinum, verður skipað fyri møti leygarkvøldið kl. 20 við luttøku av ungum. Kajberg Davidsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Elidu Kenning.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Prestagarðurin á Tvøroyri
Eldrasamkoma verður mánadagin 10. feb. kl. 16-17.30.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Mourits Viderø og Hallur Ludvig.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Sion, Vágur
Sunnumorgunin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

Møtiskrá hjá føroyska trúboðaranum í DK
10.-16. feb. í Dronningslund missiónshúsið, hvørt kvøld kl. 19.30.
17. feb. í Finnerup missiónshúsið kl. 19.30.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Tilhaldið í Sandoynni
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.
Mánadagin 10. feb.
Finnbjørn Dam sigur frá um tíðina undir krígnum
Prát
Mikudagin 12. feb.
Upplestur
Kortspæl og onnur spøl.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagin 10. februar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
kl. 14-18 Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
Skeið verður í mynsturtøving v/ nálum 13. feb. kl. 10-17. Tilm. 316491
Týsdagin 11. februar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Hugsa um ellisárini**, Elisabeth og Páll Ellingsgaard
Mikudagin 12. februar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Sjá skránna í bløðunum
Hósdagin 13. februar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-17 Mynsturtøving v/ nálum, Ása Hátún. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 14. februar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað itriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tin stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Føroya Heimavirksifelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 317959, telefax 315727.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk
Árligi aðalfundurin hjá Føringafelagnum verður hin 1. mars 2003 kl. 19 í miðgarði kl. 14, kostnaður 10,- kr. Tekning hjá Aref á tlf. 66 158289, ella hjá Randi 66 106537. Grýluveitsla fyri vaksin verður aftaná aðalfundin, kostnaður til grýluveitsluna er 50,- kr. fyri vaksin. Tekning hjá Aref á tlf. 66 158289 ella hjá Randi á tlf. 66 106537.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Anfinn Kallsberg - ert tú gegnigur?

Abraham Mikladal

Útvarpið visti í gjárkvøldið at siga, at tú hevði havt samrøðu við Annlis Bjarkhamar um starvsetanina av landsantikvari, áðrenn avgerðin var almannakunngjørd.

Síðani er eisini komið fram millum manna, at tú legði trýst á Annlis Bjarkhamar um at seta Símun V. Arge heldur enn Steffen Stumman Hansen.

Skyldast hesin atburður, at tú hevði aðrar enn sakligar orsøkir? At tú vart inhabilur? (ógegnigur)

Systursonur tín sat í setanarnevndini og var við til at innstilla Símun, og bæði systir tín og systursonurin starvast saman við Símuni á Forminnasavninum.

Er hetta ikki vert at hugsa um - nú tú so bráðrætsin fer inn í málið?

Eitt upplivilsi fyri lívið til ein ungan suðuroying

Lions klubburin á Suðuroy bjóðar ungum suðuroyingi á altjóða legu í Danmark. Legan er ókeypis.

Hitti allan heimin í Danmark!

Hetta er heiti á eini altjóða ungdómslegu, sum altjóða Lions Klubbarnir skipa fyri í summar har ungdómar úr nógvum ymsum londum hittast.

Hetta er ein lega, har einir 30 ungdómar imillum 17 og 21 ár úr nógvum ymsum londum hittast og á legununum verður skipað fyri alskyns ítrivi og tiltøkum bæði á landi og á sjógvi

Legan er í tríggjar vikur í juli mánað og hon er ókeypis, eins og Lions Klubburin rindar ferðaútreiðslurnar.

Eisini Lions Klubburin í Suðuroy fer at senda ein ungdóm á legu.

Veljast kann ímillum tríggjar ymsar legur við hvør sínum undirheiti.

Eitt dømi er legan við undirheitinum »náttúra og upplivilsi«.

Á hesi leguni er ein ørgrynna av uttandura tiltøkum, eitt nú á svimjing, »grill-kvøld« sigling við eini gamlari skonnart og tað ber eisini til at rógva í kano. Men vitjað verður eisini á tí kenda Norðsjóvarsavninum o.s.fr.

Áhugaðir ungdómar í Suðuroy, sum eru ímillum 17 og 21 ár, og sum hava hug til eina heilt øðrvísi feriu í ár, kunnu nú senda Lions klubbanum í Suðuroy eina umsókn, kanska verður tú so heppin, at tað verður tú, sum sleppur á legu og fær eitt upplivilsi fyri lívið. Men gev gætur, at umsóknarfreistin er úti longu 15. februar.

Umsóknir kunnu sendast til Páll Tummasarson á Tvøroyri. Til ber eisini at ringja á tlf.: 37 12 57, tlf. nr: 21 12 18, tlf. nr. 37 12 18, tlf. nr, 37 12 22 ella á nr. 37 53 04.

Príshækkingarnar ein veruleiki

Um fólk keypa sær tíggjutúrakort við einum av oyggjaleiðunum hjá Strandferðsluni áðrenn mánadagin, kunnu tey spara pening

STRANDFERÐSLAN
Solby A. Eliasen

Í útvarpinum herfyri varð sagt, at fólk kunnu spara pengar við at keypa sær tíggjutúrakort frá Strandferðsluni. Príshækkingin kemur í gildi mánadagin, og hon hevur millum annað við sær, at tíggjutúrakortini við eitt nú Dúgvuni hækka úr 255 krónum upp í 300. Ein ferðaseðil fer framyvir at kosta 35 krónur. Tíggjutúrakortini til bilar kosta enn 680 krónur, men frá mánadegnum av fara tey at kosta 765 krónur.

Men verandi tíggjutúrakort kunnu keypast til og við sunnudagin, so her hava ferðafólk møguleika til at spara pening.

Hetta er sjálvandi galdandi fyri allar oyggjaleiðirnar hjá Strandferðsluni, har ein príshækking fer fram komandi mánadag.

Skúrimaskina og vatnsúgvari DEMO

Við TASKI 165 ergodisc 165 skúrimaskinuni fær tú nógvar funktiónir í einum

TASKI ergodisc er ein rættur garpur við heili 165 0/min, men hóast tað rættiliga stillføru. Sera vælegnaður til uppskúring av bæði vátum og turrum gólvum. Við eini vekt á 42 kg gevur hann eitt fjort poleringsúrslit.
Maskinan fæst við einum vatntanga á 14 litur og haldara. Til ber at seta skúribust ella vaskibust til.

TASKI vacumat 22 vatnsúgvari við stórari megi

Her fær tú ein stillføran vatnsúgvara við stórari megi. Hann hevur ein ketil sum tekur 22 litrar og er vælegnaður til allar uppgávur innan vatnsúgving. Sniðið er kompakt, hann er lættur at tøma við handtakinum á botninum umframt eitt berihandtak ovast. Súgviútgerðin er sniðgivin á ein hátt, sum gevur møguleika fyri góðum arbeiðsstøðum

Vanligur prísur fyri bæði skúrimaskinu + vatnsúgvara kr. 26.151,00

TILBOÐ: kr. 16.600,00 (bert eitt sett)

A. H. Jensen
Stoffalág 25 · tlf: 322676 · fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo

Vetrarferðatilboð 14.09.2002 - 10.05.2003
The North Atlantic Link



galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er:
Ferðin aftur og fram við Norrøna í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu fritiðardeplum.
Danland hevur eisini lítknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrøna í einum av nevndu kamarsslagum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstoðum.
Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals
4.995,- gisting 7 nætur
Hesir eru í Søndervig, Fano, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.

Shetland Cruise

	4-koyggjuk. við WC/bað	2-koyggjuk. við WC/bað
Grand-/Queens Hotel	1.550,-	1.730,-
Shetland-/Lerwick Hotel	1.690,-	1.870,-
Herrislea House Hotel	1.550,-	1.730,-
Privat Gisting	1.280,-	1.460,-
Vallaraheim	1.010,-	1.190,-

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

	4-koyggjuk. við WC/bað	2-koyggjuk. við WC/bað
Grand-/Quenns Hotel	4.100,-	4.280,-
Shetland-/Lerwick Hotel	4.940,-	5.120,-
Herrislea House Hotel	4.100,-	4.280,-
Privat Gisting	3.220,-	3.400,-
Vallaraheim	2.030,-	2.210,-

Easterhoull Chalets
í viku í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

	4-koyggjuk. við WC/bað
Hús við 2 rúmum	4.940,-
Hús við 3 rúmum	5.630,-

Pakkaferð við gisting á hotelli
Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrøna í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm fyri hvønn 3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað 2.990,-

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað 2.200,-

SMYRIL LINE
e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00